

# Rannvá og Rúna

*Sendingin um Rannvá og Rúnu verður send í Sjónvarp Føroya jóladag kl 20.00*

**Rannvá og Rúna vórðu føddar í 1990. Tær vóru tríburðar, men tá tær vóru ein mánað gamlar, doyði triða systirin. Tær ganga í fjórða flokki í Sørvágs Skúla – og eru fastur partur av bygdarmyndini**

Í 1990 fingu Herfríð og Eli Falkvard í Sørvági tríburðar. Stutt eftir varð staðfest, at allar tríggjar genturnar vóru mongolar.

Tá tær vóru ein mánað gamlar, doyði ein av gentunum.

Í dag eru tær báðar, Rannvá og Rúna, 12 ára gamlar, og tær ganga í fjórða flokki í Sørvágs Skúla. Tær eru glaðar og lívligar og eru ein fastur partur av bygdarmyndini.

Hóast genturnar klára seg væl, stúra foreldrini eisini fyri framtíðini, og hvat skal verða av gentunum.

Sendingin »Rannvá og Rúna« er ein lívsjáttandi sending, sum vísir okkum gerandisdagin hjá tvíburðunum og familju teirra.

Lagt til rættis: Barbara Samuelsen.




